# Epileptikarafelagið havt aðalfund

**Epileptikaraelagið finst á aðalfundi at, at eingin neurologur er fast tilknýttur Landssjúkrashúsinum**

Í tíðindaskrivi sigur Epileptikarafelagið, at felagið hevði aðalfund í seinastu viku. Fýra nevndarlimir stóðu fyri vali, og ein teirra bar seg undan afturvali. Hinir tríggir vóu afturvaldir.

Nevndin skipaði seg soleiðis: Randfríð Sørensen, formaður, Mari Johannesen, næstformaður, Ása Østerø, skrivari, Elma Berg Danielsen, kassameistari, Pauli Thomsen, nevndarlimur, Elisabeth Leo, tiltakslimur og Gullberg Gullfoss, tiltakslimur.

Tosað varð um neurologtænastuna á Landssjúkrahúsinum, sum aðalfundurin ikki helt vera nøktandi. Semja var um, at okkurt munagott má gerast á tí økinum.

Einasti neurologur, sum er í Føroyum, er bert konsulentur fyri Landssjúkrahúsið, og tað helt fundurin ikki vera nøktandi. Ynskiligt hevði verið við eini sjúkrasystir, sum kundi verið kontakspersónur hjá epilepsisjúklingum.

**ej**



*Konsertin mikukvøldið í Vágs Skúla byrjar klokkan 19:30 og øll eru vælkomin*

*Mynd: D. Olsen*

# Tónleikanæmingar aftur á ferð

**Næmingar í Musikkskúlanum í Suðuroynni fara mikudagin aftur á rundferð og verður tað syðra helvt av Suðuroynni, ið nú sleppur at hoyra jólatónar**

TÍÐINDASKRIV

Mikudagin í síðstu viku vitjaðu musikkskúlanæmingar í Suðuroynni skúlar í norðaru helvt av Suðuroynni og á kvøldi var konsert fyri foreldrum og øðrum áhugaðum.

Mikudagin fara næmingarnir aftur á ferð og leisturin er hin sami, men nú fáa skúlar í syðru helvt av Suðuroynni vitjan og á kvøldi verður konsert í Vágs Skúla fyri foreldrum og øðrum áhugaðum.

Konsertin mikukvøldið í Vágs Skúla byrjar klokkan 19:30 og øll eru vælkomin.

# Føroysk gransking

TÍÐINDASKRIV
*Norrøna Felagið*

"Føroysk gransking í altjóða høpi" er heitið á fyrilestri, sum Pál Weihe, yvirlækni og granskari, heldur í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 8. desember kl.19.30.

Í fyrilestrinum fer Pál Weihe at greiða frá, hvussu nógv verður brúkt til gransking í Føroyum, og hvat kemur burtur úr, tá mett verður í greinum í altjóða tíðarritum. Norrøna felagið í Føroyum skipar fyri, og fyrilesturin er almennur.

# Ternan loysir Teistan av

**Meðan Teistin er til eftirlit, røkir Ternan siglingin aum Skopunarfjørð**

TÍÐINDAKSRIV

Mánadagin 6. december fór Teistin til eftirlit v.m., og í tí sambandi fer Ternan at røkja siglingina um Skopunarfjørð, til Tesitin er afturkomin, sigur Strandferðslan í tíðindaskrivi um dagarnar.

Eftirlitið fer at vara til fram móti jóluk. Men jólaferlsuna væntar Strandferðslan at klára við Teistanum, sum tða skuldið veirð tøkur aftur.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 50, 2004
www.kaupthing.fo

# Færri arbeiðspláss stovnsett í USA

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku komu fleiri búskaparlig lyklatøl, umframt at evropiski miðbankin (ECB) hevði rentufund. Hóast fleiri av hesum tølum vóru jalig, so gjørdist mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA eitt vónbrot, so rentur og summi partabrøv lækkaðu. Einans 112.000 nýggj arbeiðspláss vóru stovnsett í USA í novembur, í mun til tey 200.000 ið vóru væntað.

Tað lýggja veðrið í USA farnu vikurnar hevur økt um oljugoymlsurnar. Oljuprísurin er tí lækkaður niðurum 40 dollarum fyri tunnuna, sum er tað lægsta í 3 mánaðar. ISM-ídnaðarálitið úr USA gjørdist eitt sindur frægari enn væntað, og tað fekk rentur og serliga partabrøv at hækka eitt tíðarskeið í farnu viku.

ECB gjørdi á rentufundinum í farnu viku greitt, at tey ikki fara at hækka rentuna í næstum, tí útlitini fyri búskaparvøkstri í Evropa eru versnaði av veika dollaranum, sum er á lægsta stignum síðan 1995. ECB læt eisini frætta, at tey eru sinnaði at gera neyðugu inntrivini, um trýstið á evruna gerst ov stórt. Eisini útlitini fyri eini varandi, høgari prísulegu á olju, kann tarna búskaparvøkstrinum í Evropa, sum frammanundan er viðbrekin. Hetta ger at óvissan um búskaparvøksturin í Evropa er økt og ein møgulig rentuhækking í Evropu er tí skotin longur út í framtíðina.

Heldur stóra gjaldsjavnahallið í USA og veiki dollarin fram, kann væntast, at vøksturin í USA fer at mennast í mun til Evropa. Tískil kann roknast við, at renturnar í Evropa og USA fara at flyta seg longur burtur frá hvør øðrum. Ein slík gongd er sjáldan varandi. Tí kann væntast, at evropisku rentunar sum frálíður fara at nærkast teimum amerikonsku aftur.

Hóast vánaligu arbeiðsmarknaðarfrágreiðingina hækkaðu amerikansku partabrøvini í farnu viku, meðan tey norrønu lækkaðu.

Hendan vikan er tunnlig hvat lyklatølum viðvíkur. Týska ZEW-vísitalið, amerikansku framleiðsluprísirnir og brúkaraálit eru á skránni. Marknaðirnir meta ikki, at hesi tøluni fara at ávirka rentuavgerðina hjá ECB um at halda rentuna óbroytta, ella hjá FED um at hækka hana 0,25%-stig næsta rentufund. Ein friðarlig vika fyri rentur og partabrøv kann væntast.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,33% | -0,04% |
| 5 ára lánsbræv | 3,09% | -0,09% |
| 10 ára lánsbræv | 3,94% | -0,09% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 284,9 | 0,1% |
| OMX, Svøríki | 738,8 | -0,9% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.901,5 | 0,4% |
| S&P 500, USA | 1.191,2 | 0,7% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,15 | -0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 107,80 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 87,57 | -0,7% |
| Altjóða Vøkstur | 58,73 | 1,4% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,52 | -1,3% |
| EUR | 7,43 | 0,0% |
| GBP | 10,73 | 1,3% |
| NOK | 0,91 | -0,4% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*